

Sigvør B. Johannesen gav skipinum navn.

# Thor fær triðja nýbygningin Thor Frigg

**Jan Müller**

30.07.2015 - 13:42

Oljan.fo

Kl 11 í morgun bleiv M/V Thor Frigg handað Thor reiðarínum á Besiktas skipasmiðjuni í Turkalandi. Eitt hátíðarhald við umboðum fyri reiðaríið og innbodnum varð hildið, har alt gekk uppá stás.

M/V Thor Frigg bleiv sjósett 30. apríl og hevur arbeiðið gingið heilt væl sigur Thor í tíðindaskrivi. M/V Thor Frigg er nummar trý í røðini av fýra nýbygningum hjá felagnum, sum eru serútgjørdir til fleirtáttaðar tænastur fyri seismikskip. Skipini verða øll flokkað í hægsta umhvørvis- og ísklassa, nevnt: Clean Design, Recyclable og Ice-1A og eru 64,4 metrar til longdar og 2089 BT til støddar.

Nýbygningarnir hjá Thor setir felagið í ein klassa fyri seg innan seismikk support vinnuna og ruddar slóð fyri nýggjum tænastumøguleikum hjá felagnum.

Tað var Sigvør B. Johannesen, sum doypti skipið. Sigvør er kona ein av eigarunum av Thor, Gunnbjørn Joensen.

Thor hevur langtíðar sáttmálar við PGS, og Thor Frigg fer beint í arbeiði.













